## Nógvir skilnaðir

Árini frá 2004 til 2007 fækkaði talið á hjúnarskilnaðum í Danmark, men í fjør fór tað aftur at ganga hinvegin, og tann gongin hevur hildið fram higartil í ár. Tað vísa tøl hjá donsku hagstovuni. Tølini vísa, at í fjør vóru 14.695 hjúnarskilnaðir í Danmark, og tað var fýra prosent fleiri enn árið fyri. Harafturat vísa hagtølini, at vøksturin er serliga stórur hjá hjúnum, sum hava verið gift stytri enn fimm ár. Hetta kann kanska tykjast eitt sindur óvæntað, tí undanfarin ár var tað júst hesin bólkurin, sum hevði lutfalsliga fáar skilnaðir, sigur DR.



## Rækjumenn egna deild

Leiðslan í grønlendska fiski- og veiðimannafelagnum KNAPK hevur gjørt av, at felagið skal vera meiri virkið, eisini tá tað snýr seg um lóggávu og kunngerðir á virkisøki felagsins. Í tí sambandi hevur leiðslan gjørt av at víðka umsitingina og at skipa eina serliga felagsdeild fyri teir, sum fiska rækjur. Tað sigur formaðurin í fiski- og veiðimannafelagnum, Leif Fontaine, við kringvarpið KNR. Tann nýggja deildin hjá rækjumonnunum skal ikki einans taka lut í samráðingunum um prísir, men skal eisini halda eyga við lógum og kunngerðum á økinum.



# Froskmannafelagið á dyr

**Tórshavnar Froskmannafelag er við sínum 140 limum blakað á dyr. Fyrst varð felagið blakað úr Reinsarínum, og nú skal garasjan rívast niður, so ein nýggj Perla kann byggjast í staðin**

HØLISKRÍGGJ
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Í seinastu viku fréttist um ætlanir hjá Tórshavnar kommunu um at ríva garasjuna í Tórsgøtu niður, sum Tórshavnar Froskmannafelag hevur húsast í. Ætlanin er at ein nýggj Perla skal byggjast á staðnum, ið skal vera nýggja spælistaðið í Havn.

Trupulleikin er bara tann, at har húsast eitt felag, sum í gjár varð sett á gøtuna, uttan at hava fingið hóskandi hølir í staðin. Talan er um Tórshavnar Froskmannafelag. Felagið hevur seinastu árini verið flutt runt í ymisk høli. Fyrst skuldi felagið út úr Müllers Pakkhúsi, síðan var felagið tveitt úr ovaru hædd á Reinsarínum, og nú er felagið biðið um at flyta síni ting út úr garasjuni. Uttan ávaring.

- Hetta er ein katastrofa. Nú standa vit við ongum. Vit hava verið víst í hølir í Saltsøluni, sum í orðsins rætta týdningi má sigast at vera ein fyribils loysn, tí har kunnu vit als ikki vera, sigur Ingi Sørensen, ein av virknastu kavarunum í felagnum.

### Stór skomm

Tórshavnar Froskmannafelag er tað næst elsta í ríkinum, og varð tað stovnað í 1957. Felagið hevur 140 limir, og millum uppgávurnar hjá Froskmannafelagnum er at hjálpa til, tá vanlukkur henda á sjónum, og at taka sær av árliga ruddingardegnum í vágni. Hølini hjá Froskmannafelagnum verða fyrst og fremst nýtt til kompressararúm, har kavarar fylla luft á fløskurnar.

- Tað er hjartað í felagnum. Tað sum nú hendir, er at vit hava einki høli til at halda fundir í ella har limir kunna hittast. Tað er stór skomm. Vit hava havt vitjanir av øðrum feløgum úr Danmark, og tá er tað pínligt ikki at hava eitt høli, at vísa fram, sigur Ingi Sørensen.

Ingi Sørensen stúrir fyri at felagið fer í upployson um ikki okkurt verður gjørt við støðuna. Nýggju hølini egna seg ikki til Froskmannafelagið, og limirnir harmast um umstøðurnar.

- Vit høvdu eina munnliga avtalu við kommununa, um hølini, vit hava húsast í. Tá vit so vóru útblakað úr Reinsarínum, lovaði kommunan eina kompensatión fyri køk, brúsurúm uppihaldsrúm, vit høvdu innrættað á loftinum í Reinsarínum. Men kommunan hevur ikki hildið sítt lyfti, og standa vit nú á gøtuni við eini óbrúkligari loysn, sigur Ingi Sørensen.

# Loysnin er nýbygging

**Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, ásannar at hølisviðurskiftini hjá Froskmannafelagnum ikki eru nøktandi. Loysnin er at byggja felagnum nýggj høli**

HÚSVILL
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

- Tað er rætt, at Froskmannafelagið er biðið um at fara úr hølunum. Skulu vit hava Perluna klára til ólavsøku, mugu hølini tømast beinanvegin, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin hevur havt fleiri fundir við Tórshavnar Froskmannafelag um truplu hølisviðurskiftini. Víst hevur verið á loysnir í umhvørvinum nær sjóvarmálanum, men áhugi hevur ikki verið fyri at húsast saman við øðrum. Kommunan vísti á hølini hjá Datatænastuni, sum kundu nýtast saman við Havnar Bjargingarfelag og róðrarfelagnum, Knørri. Men áhugi var ikki fyri uppskotinum, og tí er ein fyribils loysn funnin til Tórshavnar Froskmannafelag, um at fara í Saltsøluna til ein varandi loysn verður funnin.

- Eg var sjálvur á fundi hjá Tórshavnar Froskmannafelag, har vit tosaðu um trupulleikan. Har tosaðu vit um loysnina at byggja nýggjan bygning til felagið, og eg vísti á útmerkað øki til slíka bygging, sigur borgarstjórin í Tórshavnar kommunu.

Borgarstjórin undirstrikar, at sjálvandi skal Froskmannafelagið hava líka góðar umstøður sum onnur feløg í kommuni. Avgjørt er at hyggja fram eftir, heldur enn aftureftir, og finna best hugsandi loysn til felagið, sigur borgarstjórin.